Vinnumálaráðið

Dagfesting:	30.04.2026
Mál nr.:	25/29959
Málsviðgjørt:	JM/TGL
Ummælistíð:	Skrivið frá/til
Eftirkannað:	Lógartænastan dagfestir

Uppskot til

Kunngerð
um
landbúnaðarstuðul

Við heimild í § 3, stk. 4, § 6 og § 21 í løgtingslóg nr. 89 frá 7. mai 2025 um landbúnaðarstuðul verður ásett:

Almennar ásetingar

§ 1. Landbúnaðarstuðul kann latast einstaklingum, virkjum og feløgum, treytað av, at umsøkjarin er bókhaldsskyldugur og meirvirðisgjaldsskrásettur sambært galdandi lóggávu, og sum hava ein árligan umsetning oman fyri 50.000 kr.
Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi fyri stuðul, sum verður latin eftir § 10 og §§ 17-20.

§ 2. Búnaðarstovan umsitur allan landbúnaðarstuðulin.
Stk. 2. Umsóknir um stuðul eftir §§ 7-20 skulu skrivast á serligt oyðublað hjá Búnaðarstovuni, ið er at finna á heimasíðu stovnsins: www.bst.fo.

§ 3. Tá søkt verður um stuðul, skulu hesar upplýsingar altíð latast:
1) navn á umsøkjara og p-tal ella v-tal,
2) adressa og teldupostadressa, og
3) hvønn stuðul, søkt verður um.

§ 4. Landbúnaðarstuðulin verður latin av konto 6.33.2.10 á løgtingsfíggjarlógini og verður latin, so leingi játtan er tøk.

§ 5. Stuðul verður latin upp í eitt ávíst krónutal, sbr. ásetingarnar í §§ 7-16.

§ 6. Stuðulin sbrt. § 6 í løgtingslógini verður í 2026 latin til gróði, fóður, flogfenað, egg og verkætlanir.

Stuðul

Mjólk

§ 7. Stuðulin til rámjólk í fyrsta flokki er í mesta lagi 1,05 kr. fyri liturin av mjólk, sum er latin mjólkarvirki og váttaður á innvigingarlista.

Avloysaraskipan

§ 8. Stuðulin til avloysaraskipan hjá mjólkarbóndum er í mesta lagi 0,10 kr. fyri liturin av rámjólk í fyrsta flokki, sum er latin mjólkarvirki og váttaður á innvigingarlista frá hesum.

Seyðakjøt

§ 9. Stuðulin til seyðakjøt er í mesta lagi 20 kr. fyri hvørt kilo av feskum kjøti, sum er selt og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.
Stk. 2. Stuðulin fyri ræst, turt ella sundurskorið kjøt verður veittur í mun til vektina av feskum kjøti.

Kálvar

§ 10. Stuðul upp á í mesta lagi 2.500 kr. verður latin fyri gøðingarkálvar, sum verða gøddir til matna.
Stk. 2. Stuðulin verður latin, tá kálvurin er ávikavist 12 mánaðir og 24 mánaðir býtt soleiðis: Í mesta lagi 1.500 kr., tá kálvurin er 12 mánaðir og í mesta lagi aðrar 1.000 kr., tá kálvurin er 24 mánaðir gamal.

Neytakjøt

§ 11. Stuðulin fyri neytakjøt er í mesta lagi 15 kr. fyri hvørt kilo av neytakjøti ella kálvakjøti, sum er selt og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.

Flogfenaður

§ 12. Stuðulin at ala flogfenað til matna er í mesta lagi 12 kr. fyri hvørt kilo av feskum kjøti, sum er selt og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.

Egg

§ 13. Stuðulin fyri egg til matna er í mesta lagi 6 kr. fyri hvørt kilo, sum er selt og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.

Grøði

§ 14. Stuðulin til grøði verður latin sum ásett krónutal fyri hvørt kilo ella hvørja eind, býtt á hvørt slag av grøði.
Stk. 2. Stuðulin er í mesta lagi:
1) 1,3 kr. fyri hvørt kilo av eplum, sum er selt og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.
2) 3,5 kr. fyri hvørt kilo av mairótum, kálrótum, reyðrótum o.ø. matrótum, sum er selt og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.
3) 4 kr. fyri hvørt kilo av gularótum, sum er selt og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.
4) 4 kr. fyri hvørja eind av káli, sum er seld og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.
5) 4 kr. fyri hvørt kilo av leyki, purrum og rabarbum sum er selt og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.
6) 4 kr. fyri hvørt kilo av frukt, sum er selt og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.
7) 1 kr. fyri hvørt kilo av korni, sum er selt og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.
8) 3,5 kr. fyri hvørja eind av salati, sum er seld og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.
Stk. 4. Stuðulin fyri at framleiða og selja kryddurtir er í mesta lagi 6 kr. fyri hvørja eind av kryddurtum, sum verður seld og váttað. Ein eind av kryddurtum merkir í hesi kunngerð ein samlað mongd av kryddurtum, sum eftir støddog háttalagi vanliga verður seld samlað.

§ 15. Kann tann, sum framleiðir grøði ella fóður, prógva, at hann hevur verið fyri missi av náttúruávum ella øðrum serligum ávum, verður latin stuðul, sum svarar til ta mistu inntøkuna, sbr. tó avmarkingarnar í § 14.

Fóður

§ 16. Stuðulin til stráfóður og annað djórafóður er í mesta lagi 2,6 kr. fyri hvørja fóðureind, sum er seld og váttað sbrt. roknskaparuppgerð.
Stk. 2. Sami stuðul fyri hvørja váttaða fóðureind verður latin teimum, sum brúka fóðrið til egna framleiðslu.
Stk. 3. Stuðulin fyri hvørja fóðureind verður latin eftir metta miðal fóðurvirðinum, sbr. skjal 1.

Stk. 4. Stuðul til fóður, sum ikki er nevnt í skjali 1, verður latin við støði í fakligari meting av fóðurvirðinum, sum Búnaðarstovan ger.

Føroysk ross

§ 17. Stuðul verður latin teimum, sum hava ryssur og greðingar, sum verða brúkt í alingini til tess at varðveita tað føroyska rossið.
Stk. 2. Stuðulin er 8.000 kr. fyri hvørja ryssu og 10.000 kr. fyri hvønn greðing.

Føroyskar gæs

§ 18. Stuðul verður latin teimum, sum hava føroyskar gæs, ið verða brúktar í alingini til tess at varðveita føroyska gásaslagið.
Stk. 2. Stuðulin er í mesta lagi 100 kr. fyri hvønn alifugl.

Føroyskar dunnur

§ 19. Stuðul verður latin teimum, sum hava føroyskar dunnur, ið verða brúktar í alingini til tess at varðveita føroyska dunnuslagið.
Stk. 2. Stuðulin er í mesta lagi 80 kr. fyri hvønn alifugl.

Skinn

§ 20. Stuðul verður latin teimum, sum hagreiða seyðaskinn við sølu og útflutningi fyri eyga.
Stk. 2. Stuðul verður latin sum endurgjald fyri kravdar djóralæknakanningar og djóralæknaváttanir.

Annar stuðul

§ 21. Stuðul kann eftir umsókn latast til aðra landbúnaðarframleiðslu.
Stk. 2. Stuðul til verkætlanir kann í mesta lagi vera upp til metta prísin á verkætlanini sambært umsókn.

Kæra

§ 22. Avgerðir eftir hesi kunngerð kunnu kærast til landsstýrisfólkið innan 4 vikur frá tí degi, umsøkjarin hevur móttikið boðini.

Gildiskoma

§ 23. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 30. apríl 2026

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður

/ Pól. E. Egholm

Skjal 1

Miðal fóðureindir fyri hvørt kilo av fóðri

	Fóðureind fyri hvørt kilo í miðal	Fóðureind fyri hvønn rúmmetur í miðal
Turt hoyggj	0,71 FE pr. kg.	125 FE pr. m^3
Súrhoyggj	0,30 FE pr. kg.	120 FE pr. m^3
Fóðurrøtur	0,06 FE pr. kg.	50 FE pr. m^3
Epli	0,11 FE pr. kg.	94 FE pr. m^3